


# Tann nýggja oljutyrlan á framsýningarferð

**Jan Müller**

04.06.2014 - 14:30

Oljan.fo

Fríggjadagin fingu oljufólk og tyrlumanningar fyri fyrstu ferð høvi at síggja ta nýggju ferða- og bjargingartyrluna, sum er av slagnum Airbus EC 175, og sum franska tyrluverksmiðjan Airbus Helicopters hevur bygt. Hetta felagið æt fyrr Eurocopter.

Frode Østnæs, sum er stjóri í felagnum, sum umboðar fronsku verksmiðjuna í Noregi, sigur við Teknisk Ukeblad, at Airbus EC 175 er framtíðar flutningsmaskinan á norskum oljuøki. Hann er heldur ikki í iva um, at um nøkur ár fer hetta tyrluslagið at flúgva á norska landgrunninum.

Tyrlan, sum vitjaði á Sola-flogvøllinum hendan dagin, hevði 16 stólar til ferðandi, og tað er rúmligt hjá ferðafólkinum. Hon flýgur væl skjótari enn aðrar tilsvarandi tyrlur, hon ristist heldur ikki so illa sum aðrar, og so brúkar hon minni brennievni enn hinar.

**Kann flúgva langt**

Airbus EC 175 kann flúgva 140 fjórðingar, og tað merkir, at hon kann flúgva út til 80 prosent av oljupallunum á norskum øki. Ferðin er knappar 300 kilometrar um tíman, og hon flýgur sostatt skjótari enn tær flestu tyrlurnar í oljuvinnuni.

Airbus EC 175 bleiv góðkend í januar, og tað var sostatt ein meiri at kalla spildurnýggj tyrla, sum var á Sola-vøllinum fríggjadagin.

Enn hevur einki norskt felag bílagt ta nýggju fronsku tyrluna, men fleiri feløg hava bílagt tyrlur av slagnum Airbus 64 EC 175, og tær fyrstu skulu latast seinni í ár.

**Bíligari**

Tær flestu tyrlurnar, sum flúgva á norska oljuøkinum í dag, eru av slagnum Super Puma, men sambært Teknisk Ukeblad er tað ikki óhugsandi, at tær fara at fáa kapping frá teirri nýggju Airbus-tyrluni.

Ein orsøk, til at fleiri síggja Airbus-tyrluna sum eitt gott alternativ, er, at hon er ikki so dýr, og so eru útreiðslurnar til rakstur og viðlíkahald heldur ikki so stórar. Harafturat er vert at nevna, at oljuvinnan er farin at spara, og í so máta kemur Airbus-tyrlan til tíðina.

Tað var ikki bara Stavanger, sum fekk vitjan av nýggju tyrluni. Frammanundan hevði hon verið í Aberdeen og í Norwich.